## Blóðgevadagur í Miðlahúsinum



Hósdagin 14. juni er Altjóða Blóðgevadagur. Í tí sambandi skipar Felagið Blóðgevi fyri hugnakvøldi í Miðlahúsinum. Til hugnakvøldið í sambandi við altjóða blóðgevaradagin verða fyrilestrar og undirhald. Bjarni á Steig, yvirlækni og serlækni í blóðsjúkum heldur fyrilestur um blóðgávu og um, hvat blóðið kann nýtast til í viðgerðini av ymsum sjúkum. Starvsfólk í blóðbankanum greiða frá, hvussu blóðgáva fer fram, og hvussu blóðið verður viðgjørt í bankanum. Eisini verða nøkur hagtøl frá blóðbankanum løgd fram. Undirhald verður eisini á skránni, og nýggir blóðgevar kunnu tekna seg. Tiltakið byrjar kl. 19.30.

## Lík av pinkubarni funnið

Tá Odense á skuldi reinsast í gjáramorgunin, funnu arbeiðararnir ein hvítan posa við einum lítlum barni í. Hetta veit danska heimasíðan bt.dk at siga. Líkið var so illa farið, at tað ikki ber til at siga, um talan er um ein drong ella eina gentu. Talsmaðurin hjá kriminalløgregluni í Odense, Herman Overgaard, sigur, at tað kann hugsast, at ein kvinna hevur fingið barnið í loyndum og síðani beint fyri tí. Læknar skulu nú kanna, hvussu leingi barnið hevur ligið í ánni, og hvussu gamalt tað var.

# Hiti burtur úr kulda

**Tvey virki í Eysturoynni hava í felag gjørt eina verkætlan, ið bæði sparir pening og er við til at minka um dálking av umhvørvinum**

*Birgir W. Høgnesen*
*birgir@sosialurin.fo*

Talan er um Tavuna í Leirvík og Hógv í Sældarfirði, sum hava arbeitt saman um eina skipan, ið er fyrsta av sínum slagi.

Jákup Olsen, stjóri á Hógv, sigur, at teir eru væl nøgdir við úrslitið.

Tavan í Leirvík er eitt fiskavirki, sum eins og flest onnur hevur eina frystiskipan, ið nýtir nógva orku, og sum eisini gevur nógvan hita av sær, ið annars ikki verður gagnnýttur.

Jákup sigur, at tað er hesin hitin ið nú verður endurvunnin úr køliskipanini, og nýttur til at hita bygningin og heitt vatn við.

Tavan hevur havt skipanina í meira enn eitt ár, og teir hava staðfest, at hetta er ein sera góð íløga. Saman við nýggju skipanini hevur Tavan fingið nýggjan orkusparandi ketil frá Hógv.

Hógv er eisini í ferð við at seta eina líknandi skipan upp á einum øðrum fiskavirki.

Tað er Hógv, ið hava ment skipanina og sett hana upp. Kølisíðan í skpanini er gjørd í samstarvi við Johnson Controls; ella York Køletekni.

Jákup Olsen vísur á, at hetta er ein rættiliga stór orkusparing fyri virkini og er eisini við til at minka um dálkingina av umhvørvinum.



*Saman við Hógv í Søldarfirði hevur Tavan í Leirvík gjørt eini orkusparandi skipan, har hiti fæst burtur úr kulda*

# Veiðitjóvar umskipa tosk í Smoguni

**Norska sjóverjan kom gjáramorgunin fram á eitt russiskt og eitt georgiskt skip, sum umskipaðu fisk í Smoguni.**

VEIÐITJÓVAR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Yvirmenninir á teimum báðum skipunum fingu ein hvøkk, tá norska sjóverjuskipið "Andenes" klokkan fimm gjáramorgunin kom frá á tey, júst sum tey vóru í ferð við at umskipa tann ólógliga fiskin. Sambært sjóverjuni royndu skikpini at fjala, hvat tey fingust við, men tað miseydnaðist. Skipini royndu eisini at taka til rýmingar, men tað eydnaðist heldur ikki. .

Norska sjóverjan hevur ikki nevnt nøkur tøl, men sigur, at skipini umskipaðu rættiliga nógvan tosk. Sagt verður, at tað var týðiligt, at yvirmenninir á teimum báðum skipunum høvdu ikki væntað at fáa vitjan av einum sjóverjuskipi, og at tann óvæntaða vitjanin kom púra óvart á teir. Smogan er altjóða sjógvur, men NEAFC-londini hava samtykt at hava eftirlit við øllum skipum har fyri at steðga ólógligu veiðini.

### Skiftir navn

Tey bæði skipini, sum "Andenes" kom framá, eru gamlir kenningar hjá norsku sjóverjuni. Annað skipið eitur ella rættari sagt brúkar navnið "Merlin", men tað er einki skip við hesum navninum, sigur sjóverjan. Skipið hevði heldur einki flagg gjáramorgunin. Hetta sama skipið hevur fyrr itið "Sindbad". Tað er eisini tað rætta navnið, og hetta skipið er skrásett í Georgia.

Hitt skipið eitur "Mumrinskiy". Tað er skrásett í Risslandi, og tá Russland er limur í NEAFC, umfata reglurnar um Smoguna eisini russisk skip. Tí fáa russisku myndugleikarnir nú eina frágreiðing frá norsku sjóverjuni um virksemið hjá skipinum.





*Merlin ella Sindbad (ovara myndin) og Mumrinskiy (niðara myndin) eru gamlir kenningar í Smoguni*